# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

## Sigur til Tomislav

Tað eydnaðist Tomislav Sivic og ungverska felag hansara, Kecskemét, at taka eitt týðandi fet frá botninum í bestu deildini um vikuskiftið. Kecskemét spældi á heimavølli móti Gyor, sum annars er partur av oddastríðnum, og tað eydnaðist Tomislav og hansara monnum at vinna dystin 1-0.

Við hesum hevur Kecskemét sjey stig eftir fyrstu seks umførini, og tað er væl og virðiliga góðkent, nú felagið fyri fyrstu ferð yvir høvur roynir seg í bestu deildini.

Hetta var annars fyrsta ferðin í trimum umførum, at Tomislav sat á beinkinum undir dysti. Tá Kecskemét í øðrum umfari tapti 1-0 móti ZTE, hendi hetta við 9 monnum móti 11 í øllum øðrum hálvleiki. Og tá Sivic metti dómaran hava snýtt teir fyri brotsspark í evstu løtu fekk svartklæddi maðurin at vita, hvat venjarin helt um hansara avrik. Og tað kostaði altso leikbann í tveir dagar.

**-mørk**

## Tap til ÍF Føroyar

Føroyska útisetaliðið spældi í gjár á útivølli móti BK Fix, og dysturin endaði við 3-1 tapi.

ÍF Føroyar kom annars væl frá byrjan. Johan V. Gunnarsson breyt ígjøgnum í vinstru og legði innfyri, har verjuleikari beindi bóltin í egið net, og harvið legði ÍF Føroyar framum. Men tað eydnaðist tó BK Fix at javna fyri steðgin, so hálvleiksstøðan var 1-1.

Í seinna hálvleiki eydnaðist tað BK Fix at fáa tvey mál aftrat, meðan tað hildnaðist minni væl hjá føroyingunum, sum soleiðis taptu ein annars hampiliga javnan dyst.

**-mørk**

# Súni liðugur fyri árið

**Tað verður ikki á føroysku vøllunum, at Súni Olsen fer at gera um seg í ár. Transferreglurnar forða nevnliga fyri einum skifti, nú sáttmálin við B36 er skræddur sundur. Hinvegin er møguleiki at spæla í Danmark**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Súni Olsen hevur rættiliga verið í brennideplinum seinastu dagarnar. Tveir dagar á rað hevur hann prýtt forsíðuna á Dimmalætting eftir eina hending á Eclipse í Havn um vikuskiftið.

B36 og Súni Olsen høvdu í gjár fund um málið, og niðurstøðan er, at Súni Olsen er liðugur í B36.

Kristjan á Neystabø, formaður í B36, sigur seg harmast tað, sum hent er.

- Men vit eru so samdir um, at samstarvið steðgar her og nú, er einasta viðmerkingin, sum Kristjan á Neystabø vil gera um málið.

Tað er tó eingin ivi um, at tímalønin hjá Súna í B36 hevur verið høg. Vanligt er, at spælarar fáa ein sonevndna sign-on-fee, tá sáttmáli verður undirskrivaður, og hartil skal eisini roknast løn fyri teir báðar mánaðirnar, sum spælarin hevur verið í B36. Á vøllinum gjørdist talan tó bert um tvær ferðir 90 minuttir móti KÍ og Brøndby, so tímalønin hevur ikki verið at teimum minstu.

### Vindeygað stongt

Í summar vóru fleiri føroysk feløg, sum sýndu áhuga fyri at knýta gøtumannin at hópinum, og var hann ikki skaddur í løtuni, høvdu onkur av hesum helst heldur enn fegin roynt at styrkt sær um hópin.

Sonevnda flytingarvindeygað ger tó effektivt ein enda á hesum spekulatiónum, tí tað er als ikki loyvt at skifta felag millum flytingarvindeyguni. Tað vil við øðrum orðum siga, at hetta kappingarárið hevur Súni Olsen als ikki møguleika at skifta til annað føroyskt felag.

Hinvegin er møguleiki at skifta til danskt felag. Er talan um spælara, ið er sonevndur free-agent – altso uttan sáttmála – kann hesin nevnliga knýtast at hópinum sum áhugaspælari. Í løtuni er hetta tó óaktuelt hjá Súna Olsen, sum hevur eitt brot í fótinum, og sum tí als ikki fær spælt.



*Ein heldur býttislig ger á Eclipse um vikuskiftið kostaði Súna Olsen dýrt. Spælarin er ikki longur partur av Formula-hópinum hjá B36*

## Sightseeing í Kvívík

Talan hevur verið um nakrar strævnar dagar hjá føroyska landsliðshópinum seinastu vikuna. Umframt harða dystin í Beograd hevur nógv ferðing eisini verið á skránni, og tí gjørdi landsliðsvenjarin av at strika seinnu venjingina í gjár. Ístaðin fór liðið á lítla útferð til Kvívíkar, har myndamaður okkara eisini rendi seg á hópin.



*Landsliðið*

Mynd: Jens Kr. Vang